# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum vitjaðu, sendu blómur og fjarrit og á annan hátt gjørdu gullbrúdleypsdag okkara 30. mars ógloymandi.

Tøkk til børnini, sum á ein serligan hátt gjørdu dagin hugnaligan og minnisríkan.

**Bestu heilsanir**
**Dania og Gunlaif Vestergaard**
**Hoyvík**

Lesið Sosialin
-so eru tit við!

## Heiðursmerki frá drotningini á fráfaringardegnum

**Týsdagin 31. mai legði 67 ára gamli Osvald Hansen í Havn frá sær eftir trúgva tænastu hjá SEV í 40 ár. Sama dag fekk hann heiðursmerki frá drotningini**

Tíðindaskriv frá SEV



Tað var ikki sørt rørandi á innanhýsis samkomu hjá SEV týsdagin, tá ið Osvald Hansen legði frá sær starvið hjá Elfelagnum eftir trúgva tænastu í 40 ár. SEV fyllir 60 ár næsta ár, sostatt hevur Osvald verið við til at bygt og ment SEV í tveir triðingar av tíðini, felagsskapurin hevur verið til.

Á samkomuni handaði Klæmint Weihe, stjóri, Osvaldi, heiðursmerki frá drotningini fyri trúliga at hava tænt landi og fólki í 40 ár.

Osvald er 67 ár, og í fjør fór hann úr starvinum sum verkmeistari á Sundsverkinum, men hann valdi at halda fram hjá SEV við ymsum fyrifallandi arbeiði, til hann hevði verið í starvi í 40 ár tann 31. mai 2005.

Tað tykist løgið, at 31. mai var dagurin, Osvald Hansen byrjaði sína yrkisleið hjá SEV. Men soleiðis lagaði tað seg bara fyri 40 árum síðani, tá gamli stjórin, Hjalgrím Winther, bað Osvald koma til arbeiðis. Osvald Hansen ringdi til stjóran tann 30. mai 1965 viðvíkjandi starvinum hjá SEV, og Hjalgrím Winther bað hann koma til arbeiðis dagin eftir.

Osvald tók við sum verkmeistari á Havnarverk-inum, sum varð í gerð, tá hann byrjaði hjá SEV. Sostatt var hann við til at gera Havnarverkið liðugt, har hann setti upp tveir motorar. Fyrst í sjeytiárunum fór SEV undir at byggja Sundsverkið, sum í dag hevur fimm dieselmotorar. Osvald Hansen setti upp allar motorarnar á Sundi - og hann hevur eisini skift útaftur tveir teir fyrstu motorarnar á Sundi og tikið niðuraftur báðar motorarnar á Havnarverkinum. Tilsamans hevur Osvald Hansen sett upp níggju motorar á Havnarverkinum og á Sundsverkinum, sum er útbygt tvær ferðir, síðani tað varð tikið í nýtslu í 1974.

Osvald sleit sostatt fýra motorar upp, men teir megnaðu ikki at slíta hann upp. Osvald er giftur Eyðleyg, og tey eiga tríggjar synir og átta ommu- og abbabørn.

## Orknoyarferðin hjá KÍ í 1958

**Vit hava áður prentað ein mynd av tí KÍ-liðnum sum í 1958 var á vitjan í Orknoyggjum. Í tí sambandinum prentaðu vit eisini nøvnini á teimum føroysku spælarunum, sum við vóru. Nú hevur ein lesari í Klaksvík sent okkum enn eina mynd av hesi somu hending, men har kortini uppafturflaeiri leikarar úr KÍ eru við, umframt fleiri orknoyingar. Sum tað sæst hevur greinin áður verið prentað í Norðlýsinum, men vit loyva okkum kortini at prenta hana her í blaðnum.**

Úr Norðlýsinum 22. august 1958:

# Stutt yvirlit yvir Orknoyarferð KÍ's

Hvussu henda søguríka ferð kom í lag.




**KÍ leikarar**

1. Herman Dahl
2. Ludvik Jónsson
3. Kristoffur Klakkstein
4. Steinbjørn Jacobsen
5. Jógvan Jacobsen
6. Gutti Kallsberg
7. Jógvan á Høvdanum
8. Frímann Baldvinsson
9. Samuel Júst Dahl
10. Zacharias Lydersen
11. Álvur Klakk
12. Karl Isaksen
13. Karl Monrad Joensen

Hinir á myndini eru Orknoyingar - leikarar, leiðarar og býráðslimir.